

## Ansni keypt Vaktargarðin

Í næstu viku er 30 ár síðani Vaktargarðurin varð settur á stovn. Virksemið hjá Vaktargarðinum er skipað í tvey høvuðsvirkisøki, Vaktartænastuna og Alarmtænastuna, og har starvast tilsamans sjey fólk. Øll árini hevur stovnarin, Bjarni Thomsen, verið stjóri og rikið fyritøkuna. Nú hevur hann selt fyritøkuna til Ansni, sum smápartafelagið hjá Helga Justinussen, Sp/f Cura, keypti 1. januar 2006. - 30 ár eru ikki 30 vikur, og tað hevur verið spennandi at bygt upp og rikið vaktartænastur. Nú haldi eg, at kundar, starvsfólk og fyritøkan sum heild hevur bara gott av, at nýggjar kreftir sleppa at royna seg, sigur Bjarni Thomsen, sum bæði takkar starvsfólkum og kundum fyri gott samstarv øll árini, sigur Bjarni Thomsen í tíðindaskrivi frá Eik, sum hevur fyriskipað søluna. - Kundarnir fáa framhaldandi eina tænastu, ið verður minst líka góð, sum hon, Vaktargarðurin hevur veitt. Frameftir síggi eg fyri mær, at privatmarknaðurin kann gerast økið, har vit skulu vaksa. Uttanlands síggja vit, at privatkundar vilja hava alarmar móti t.d. stulduri, royki, gassi og øðrum, og hesir verða knýttir at einum sentrali, sigur nýggi eigarin, Helgi Justinussen.



*ES-prát í Keypmannahavn. Edmund Joensen, fólkatingsmaður Sambandsfloksins, ytst høgrumegin, á fundi við ES-nevndarlimin Leonard Orban, nummar tvey frá vinstru í Keypmannahavn í farnu viku. Myndina tók Bjørn Digholm*

# ES-umboð gloppar hurðina fyri Føroyum

**Tað er væl hugsandi, at fáa eina smidliga skipan, so at vit fáa fría atgongd til ES marknaðin, uttan at missa sjálvsavgerðarrættin. Tað hevur ein ES nevndarlimur boðað Edmundi Joensen, fólkatingsmanni, frá.**

FØROYAR OG ES
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er hugsandi, at ES kann finna eina smidliga loysn fyri Føroyar, um Føroyar vilja knýtast tættari at samveldinum. Tað hevur ES-nevndarlimurin, Leonard Orban, greitt Edmundi Joensen, fólkatingsmanni, frá á fundi í Keypmannahavn.

ES nevndarlimurin og Edmund Joensen hittust á fundi og tá nýtti føroyski fólkatingsmaðurin høvi til at tosa við hann um mál, sum høvdu áhuga fyri Føroyar.

- Tá kom hann við ábendingum um, at tað er avgjørt ikki óhugsandi, at tað ber til at finna eina smidliga skipan ímillum ES og Føroyar, so at vit kunnu fáa eina skipan, sum vit kunnu liva við, sigur Edmund Joensen.

### Mugu spyrja fyri at fáa svar

Spurningurin um at útvega føroyskum útflytarum fríari atgongd til ES marknaðin, hevur verið afturvendandi í føroyskum politikki í mong ár.

Men tað eru tey fægstu, sum hava viljað tosað um limaskap í ES, tí tey flestu siga, at prísurin fyri at amast uppi í ES, er, at vit noyðast at lata ræðisrættin yvir okkara fiskivinnupolitikki upp í hendurnar á ES myndugleikunum.

Tí hevur landsstýrið heldur arbeitt fyri einum limaskapi í EFTA.

Hesum hevur Sambandsflokkurin ikki verið samdur.

- Vit halda ikki, at EFTA-limaskapurin loysir nakrar trupulleikar, tí vit fáa ikki eina EBS avtalu ígjøgnum EFTA og tað merkir, at vit fáa ikki fría atgongd á marknaðinum í Evropa fyri vørum og tænastum, sigur Edmund Joensen.

Samstundis hevur Sambandsflokkurin fleiri ferðir ført fram, at tað ber ikki til at vita, hvørjar treytirnar fyri fríari atgongd á ES marknainum eru, fyrrenn vit hava samráðst við ES og spurt teir beinleiðis.

Edmund Joensen sigur, at fundurin við ES-nevndarlimur, benda á, at Sambandsflokkurin hevur grein í sínum máli.

-Tað nyttar ikki, at vit sita hvør í sínum lagi heima í Føroyum og gita.

- Fyri at fáa røttu svarini, mugu vit hava dirvi til at seta røttu myndugleikunum teir røttu spurningarnar, sigur hann.

Leonard Orban er ES-nevndarlimur við málsøkinum fleirmálsligheit. Hann er rumenari og stóð í fleiri ár á odda fyri drúgvu fyrireikingunum og samráðingunum, tá ið Rumenia gjørdist limur í ES.

Edmund Joensen sigur, at av tí sama hevur hann holla vitan um, hvussu tilgongdin er, tá ið lond og ES taka upp samstarv.

- Sostatt er hann ikki hvør sum helst í ES høpi. Hóast hetta er uttanfyri hansara málsøki, veit hann avgjørt, hvat hann tosar um, heldur Edmund Joensen.

- Á fundinum í Keypmannahavn kom fram, at Orban sær fyri sær, at ES er sinnað at finna eina smidliga loysn fyri Føroyar.

Hvat hetta merkir ítøkiliga, kom hann ikki nærri inn á.

- Men tað er hugsandi, at av tí at fiskivinnan hevur so avgerðandi týdning fyri føroyska samfelagið, eigur tað at bera til, at gera serskipanir, so at vit ikki noyðast at frásiga okkum ræðisrættin yvir fiskivinnupolitikkinun, sigur Edmund Joensen.

### Ongin forðing fyri fullveldi

Ein annar høvuðstrupulleiki í sambandi við Føroyar og ES, hevur verið um føroyar kunnu gerast limur í ES sum partur í danska ríkinum.

Tjóðveldi sigur kortanei, tí so fara vit fullkomiliga at hvørva og skal talan vera um føroyskan limaskap í ES, kann tað bara vera sum sjálvstøðugt land.

Eisini hendan spurningin umrøddi Edmund Joensen á fundinum við Leonard Orban.

- ES-nevndarlimurin greiddi frá, at báðir mátarnir bera til. Tó er vegurin upp í ES sum fullveldisland, rættiliga væl drúgvari og torførari enn leiðin gjøgnum limalandið Danmark.

- Ein trupulleiki er, at øll 27 ES-londini skulu góðkenna møguligan ES-limaskap hjá einum sjálvstøðugum landi og tað tekur mong, mong ár.

- Hinvegin er ikki vist, at sama mannagongd skal brúkast, um Føroyar velja at fara upp í ES umvegis Danmark.

Edmund Joensen staðfestir, at fara vit upp í ES sum partur í danska ríkinum, er onki, sum forðar okkum í at taka sjálvstýri seinni.

- Leonard Orban gjørdi mær greitt, at Í ES eru ongar reglar, sum forða okkum í at taka fullveldi, hóast vit fara upp í ES sum partur í danska ríkinum.

### Landsstýrið má til arbeiðis nú

Edmund Joensen sigur, at Føroyar hava stórliga brúk fyri einum nógv tættari tilknýti til Europasamveldið, enn vit hava í dag.

- ES er ein góður lykil til altjóða og millumtjóða samstarv, og vit kunnu fáa nógv burturúr t.d. vinnuliga, útbúgvingarliga, granskingarliga og mentunarliga sum heild.

Hann sigur, at nýggja landsstýrið eigur at taka upp samband við ES alt fyri eitt, so finnast kann fram til, hvussu vit kunnu nærkast samveldinum. –

- Málið eigur at vera limaskapur við undantøkum, og eg eri til reiðar at samstarva við landsstýrið fyri at finna røttu loysnirnar fyri Føroyar.